ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

**Fylgiskjal 1**

# Funktiónsanalysa – bygging av nýggjum barnaheimi

## *Málbólkur*

Sambært barnaverndarlógini stovnsetur og rekur landsstýrsmaðurin samdøgursstovnar og aðrar samdøgursfyriskipanir fyri børn fevnd av lógini eins og samdøgursstovnar fyri familjur, ið eru fevndar av lógini. Við "samdøgursstovnar" verður hugsað um stovnar, sum eru ætlaðir til bústað í styttri ella longri tíð hjá børnum og ungum, ið eru flutt úr egnum heimi og hava serligan tørv á røkt og viðgerð v.m. vegna sosialar trupulleikar og til familjur, tá tað fyri barnið verður mett neyðugt, at familjan fær familjuviðgerð á samdøgursstovni.

Málbólkurin í sambandi við bygging av nýggjum barnaheimi er sostatt børn og ung eins og familjur, ið hava tørv á viðgerð á samdøgursstovni. Sí nærri útgreining um aldursbólkarnar niðanfyri.

Málið er, at nýggja barnaheimið skal skapa eitt viðgerðarumhvørvi, har børn, ung og familjur fáa møguleika at uppliva mennandi umsorgan í einum tryggum og eggjandi umhvørvi í samspæli við vaksin fólk og eftir somu prinsippum, sum lítla barnið hevur tørv á fyri at mennast.

### Børn og ung

Barnaverndarlógin fevnir um børn og ung í aldrinum 0 til fylta 23. árið. Skilt verður í lógini ímillum børn 0 – 18 ár og ung 18 – 23 ár.

Í mun til stovnspláss til børn í aldrinum 0 – 18 ár er talan um pláss á stovni, ið kann veita ta viðgerð og hjálp, ið barnið hevur tørv á vegna umsorganarsvík og tær avbjóðingar, ið barnið annars hevur. Talan er í høvuðsheitum um sosialnámsfrøðiliga viðgerð. Búeindirnar til henda málbólk verða í høvuðsheitum kømur.

Í mun til stovnspláss til ung millum 18 og 23 ár er talan um ein øðrvísi málbólk. Sambært barnaverndarlógini kunnu fyriskipanir til henda málbólk bert setast í verk, um ein fyriskipan er sett í verk áðrenn tann ungi fyllir 18 ár – hetta, tí tá gerst tann ungi myndugur. Til ber sambært lógini at

leingja um uppihaldi á stovni fyri ein ungan, til hesin gerst 21 ár. Umframt hetta er møguleiki at seta í verk uppihald í stovnslíknandi fyriskipan eins og at seta í verk útslúsing frá uppihaldsstaðnum. Hesar báðar seinnu fyriskipanirnar kunnu setast í verk til tann ungi fyllir 23 ár. Endamálið við fyriskipanunum eru at fyrireika tann unga til eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Fyriskipanirnar til tey ungu millum 18 og 23 ár verða ofta nevndar eftirvernd, og verður hetta felagsheitið eisini nýtt í hesari frágreiðing. Búeindirnar til henda málbólk verða í høvuðsheitum smærri sjálvstøðugar íbúðir.

## Familjur

Sambært barnaverndarlógini kann Høvuðsbarnaverndarnevndin (HBVN) innskriva familju til familjuviðgerð á stovni hjá landinum sum dag- ella samdøgurstilboð. Endamálið við at innskriva familju til familjuviðgerð er at styrkja foreldraførleikan hjá foreldrunum við ráðgeving og vegleiðing og veita familjuviðgerð annars í mun til tørvin hjá familjuni. Í sambandi við familjuviðgerðina verður eisini mett um foreldraførleikan hjá foreldrunum.

Hugtakið “familja” fevnir í hesum føri fyrst og fremst um foreldur og systkin at barninum, ið búgva í einum felags heimi. Hugtakið fevnir eisini um foreldur og systkin, ið ikki búgva saman við barninum. Um onnur familja býr saman við barninum, t.d. ommur, abbar ella systkin at foreldrunum, er hendan familja eisini fevnd av hugtakinum. Í serligum føri kann hugtakið eisini fevna um aðra familju, sum ikki býr saman við barninum, men sum vitjar í heiminum. Tá talan sostatt kann verða um fleiri persónar, ið verða innskrivaðir samstundis, mugu búeindirnar til familjurnar tillagast hesum. Búeindirnar til henda málbólk verða størri og smærri íbúðir, herundir sjálvstøðugar íbúðir og íbúðir, har familjur hava felags køk.

Felags fyri málbólkarnar børn og ung og familjur er, at innskriving á samdøgursstovn fer fram umvegis HBVN sambært § 15 a og § 35 í barnaverndarlógini. Tað er HBVN, eftir tilmæli frá barnaverndartænastu, ið tekur endaliga avgerð um, hvørt eitt barn/ungur ella ein familja skal innskrivast til viðgerð á samdøgursstovni hjá landinum. Talan er um ein sonevndan lógartryggjaðan rætt til pláss. Hetta merkir, at tá HBVN tekur avgerð um, at eitt barn/ungur ella ein familja skal innskrivast á samdøgursstovn, so skal altíð pláss verða tøkt á stovninum. HBVN ansar somuleiðis eftir, at barnið/tann ungi verður sett á rættan samdøgursstovn.

### *Hvønn tørv hevur málbólkurin – herundir týdningurin av samhýsing og staðseting*

Tørvurin hjá málbólkinum er ymiskur alt eftir, um talan er um børn, ung ella familjur og eisini serliga, hvørjar avbjóðingarnar hjá ávikavist barninum/tí unga og familjuni eru.

### Verandi umstøður

Fíggjarætlanin hjá eind 10 (Barnaheiminum), er ætlað 20 børnum og ungum umframt tveimum familjum. Verandi hølisumstøður eru skipaðar soleiðis, at eindin húsast í fleiri bygningum ymsa staðni í Tórshavn. Ein fyrimunur og høvuðsgrundgevingin fyri at hava spjaddar og smærri deildir/stovnar á ymsum plássum hevur verið, at børn og ung, sum eru sett heiman, skulu búgva í heimligum umhvørvi og sethúsum so tætt at "normalitetinum" sum møguligt. Sostatt ein inkluderandi hugsan, sum er røtt og skillig. Men fakligu royndirnar vísa tó, at flestu børnini, sum verða sett á stovn, hava so stóran tørv á neyvari serfakligari viðgerð, at tað ikki kann rúmast í einum familjulíknandi stovni, sum húsast í einum vanligum sethúsum, og har starvsfólkahópurin í teimum einstøku húsunum er lítil í tali.

Trupulleikamynstrini eru so samansett og djúp, at tað skulu heilt ávísir karmar skipast, um tað skal eydnast at skapa eitt virðiligt viðgerðarumhvørvi, sum tryggjar betri menningarmøguleikar til børnini og tey ungu. Børnini og tey ungu, sum verða innskrivaði á Barnaheimið, hava tørv á einum viðgerðarumhvørvi, ið megnar at umskipa seg eftir teimum ymisku tørvunum, sum til eina og hvørja tíð eru, tað verið seg m.a. etingarólag, boarderline, cutting, rúsevnismisnýtsla eins og diagnosur so sum menningartarn, autisma og ADHD. Tí eru góðar grundgevingar fyri, at tann inkluderandi hugsjónin betur kann røkkast við eini samhýstari og savnaðari eind, sum mælt verður til í hesi frágreiðing.

## Ítøkiligu royndirnar við spjaddum deildum kunnu í stuttum lýsast soleiðis:

- Tá ið eitt nýtt barn verður innskrivað, kemur tað á Móttøkudeildina, ið er ein bygningur fyri seg. Tá ið greiningin og fyrsta viðgerðin er komin á mál, verður mett um, hvat stað, hvønn barnabólk og hvat viðgerðarumhvørvi gevur barninum bestu menningarmøguleikar. Síðani skal barnið aftur flyta, møta nýggjum starvsfólkum og nýggjum børnum. Hetta skapar ikki tann tryggleika og tann samanhang fyri barnið, sum eru alneyðug til tess at geva bestu viðgerð og hjálp til tann einstaka.

- Gransking í Norðurlondum vísir, at kynsligur ágangur kemur fyri á viðgerðarstovnum, bæði millum starvsfólk og barn og millum barn og barn. Sum støðan er nú, arbeiða starvsfólk einsamøll, og tá er lítil og eingin fyribyrging ímóti slíkum hendingum.

- Børnini og tey ungu hava ofta harðligan atburð, og starvsfólk fara til arbeiðis við ótta fyri harðskapi og hóttanum um harðskap. Um kvøldið og um náttina arbeiða starvsfólk einsamøll, og tað hevur við sær at óttin elvir til strongd.

- Børn og ung við sera ymiskum atburði og við sera ymiskum tørvi á viðgerð búgva tætt saman í smáum húsum, tey sita til máltíðirnar saman og tey noyðast at vera í sosialum støðum, sum ikki stuðla undir teirra menning.

- Fakliga viðgerðarumhvørvið, sum børn og ung hava tørv á, er ov lítið fjøltáttað og ov lítið dynamiskt í smáum barna- og arbeiðsbólkum.

- Børnini, ið eru sett heiman, hava ikki vinir í sínum nýggja nærumhvørvi, og tað er trupult at skapa vinabond við børn í grannalagnum (t.e. at “inkluderings-“ og “normalitets”-fyrimunirnir verða ikki roknir kortini í smærri eindum).

- Í ferium er neyðugt at brúka avloysarar, og í smáum eindum við lítlum starvsfólkahópi kemur tað fyri, at ov fá kend starvsfólk eru til arbeiðis kring børnini, tey ungu og familjurnar.

- Tørvurin á arbeiðstímum er sera óstøðugur á Familjudeplinum, soleiðis at skilja, at eina tíman er tørvur á tveimum og trimum starvsfólkum rundan um eina familju, sum skal hava viðgerð, og næsta tíman er bert tørvur á, at eitt starvsfólk er á staðnum. Hóast Familjudepilin als ikki er mannaður við ov nógvum starvsfólki, og hóast starvsfólkini brúka alla sína arbeiðstíð til miðvísar arbeiðsuppgávur, so ber til at gagnnýta starvsfólkatímarnar skilabetri við at hava aðrar uppgávur.

## Hvat verður betri – og hvørjir vansar kunnu vera – tá ið virksemið verður savnað?

Afturat eyðsýndum fyrimunum eru eisini vansar og avbjóðingar við at savna virksemið. Kortini ber til at leggja upp fyri hesum við neyvum ætlanum og tilrættislegging.
Í høvuðsheitum skal dentur leggjast á hesi viðurskifti:

- Nýggj børn verða innskrivað í Móttøkudeildina, sum við savnaðum virksemi gerst ein náttúrligur partur í einum samanhangandi umhvørvi hjá barninum. Tá ið greiningin og fyrsti partur av viðgerðini er komin á mál, verður mett um, hvat stað, hvønn barnabólk og hvat viðgerðarumhvørvi gevur barninum bestu menningarmøguleikar. Barnið kennir nú alt virksemið frá sínum nærumhvørvi, og hevur egna meining um, hvønn barnabólk tað vil búgva í, og kann soleiðis útinna sín rætt at hava ávirkan á sítt egna lív innan karmarnar á Barnaheiminum.

- Sosialt kontrol. Tað er ein fyribyrging í sær sjálvum mótvegis kynsligum ágangi, at fleiri vaksin fólk eru til arbeiðis á sama stað samstundis.

- Børn og ung fara eisini at hava harðligan og hóttandi atburð, tá ið virksemið verður savnað. Tað verður tó lættari at skipa og halda eitt virðiligt viðgerðarumhvørvi fyri hesi børn og ungu, tí fakliga styrkjast starvsfólkini, tá fleiri arbeiða saman. Hóttan um harðskap kennist ikki so óttafull, tá annar starvsfelagi er í nánd. Tá viðgerðarumhvørvið er virðiligt, minkar harðskapurin.

- Tað eru fyrimunir og vansar við, at børn og ung við sera ymiskum atburði og við sera ymiskum tørvi á viðgerð búgva á sama stovni. Vansarnir eru, at tey kunnu ávirkast av óhepnari atferð hvør av øðrum og menna óynskta strategi og mátar at hugsa um loysnir. Hetta kann koma fyri, um starvsfólk ikki megna at hava nóg nógv fokus á, at hvørt barn og hvør unglingi skal kenna seg sum ein einstakling við egnum tørvi, egnum ynskjum og egnum vilja millum hini børnini í bólkinum. Fyrimunurin er, at tað tryggjar margfeldið í samspælinum millum børnini og tey ungu og at viðgerðarumhvørvið gevur møguleika fyri, at børn og ung kunnu venja seg at sosialisera tvørtur um sosialar umstøður, ymisk trupulleikamynstur og dagligar avbjóðingar. Neyðugt er sjálvsagt at bólka tey soleiðis, at tey børn og ung, sum hava líknandi tørv á viðgerð, fara at búgva í bólki saman.

- Allir starvsfólkaførleikarnir verða savnaðir, og eyðsýndi fyrimunurin er, at skipast kann meira fjøltáttað fakligt viðgerðarumhvørvi, sum er fortreytin fyri, at børn, ung og familjur fáa akkurát teir menningarmøguleikar, tey hava tørv á, til tess at fáa eina nýggja byrjan uppá lívið. Sjálv viðgerðin verður meira beinrakin, tí vit fáa fleiri "viðgerðarpallar".

- Tá ið barna- og ungdómsbólkurin verður størri, hava børnini størri møguleikar at finna sær vinir og knýta vinabond. Børnini fáa eisini møguleika at vera við í ymiskum verkstaðsbólkum og øðrum frítíðarlívi, sum vit skipa, tá ið virksemið er savnað.

- Tá ið virksemið er savnað, og *øll* børnini kenna *øll* starvsfólkini, verða tað altíð kend starvsfólk kring børnini. Starvsfólkahópurin verður so stórur, at vit kunnu tryggja, at tað altíð eru starvsfólk til arbeiðis, sum børnini og tey ungu kenna væl.

- Foreldur at børnum, sum eru innskrivaði á Barnaheimið, fáa ikki ta hjálp, sum teimum tørvar, fyri at tey kunnu læra betri at skilja síni børn og tí betur at megna at stuðla sínum børnum. Hetta fara nýggju hølisumstøðurnar á Familjudeplinum at betra um við tað at møguleiki verður at skipa fyri foreldrabólkum og familjuskúla.

Við at samhýsa øllum virkseminum á einum stað, kann Barnaheimið m.a. veita:

- Betri og fjølbroyttari tilboð og viðgerð.
- Tryggari og samanhangandi viðgerðarumhvørvi hjá børnum/ungum og familjum.
- Sterkari fakligt umhvørvi og betri gagnnýtslu av førleikum hjá starvsfólki.
- Betri nýtslu av játtanum.

## Staðseting í Tórshavn

Spurningurin um staðseting av nýggjum Barnaheimið hevur fingið nakað av umrøðu, og er tí neyðugt við eini stuttari lýsing av støðuni eins og grundgevingum fyri niðurstøðuni.

Barnaheimið er í dag staðsett í Tórshavn og er karmur um eitt viðgerðartilboð til børn úr øllum landinum. Nakað av ónøgd hevur verið frá barnaverndartænastum úr øðrum økjum enn Tórshavn um

verandi staðseting, serliga orsakað av løttu atgongdini hjá børnunum/teimum ungu til náttarlív og rúsdrekka/rúsevnir, eins og frástøðuni frá heimliga umhvørvinum (serliga frástøðuni frá Suðuroynni).

Í mun til vansarnar við lættari atgongd til náttarlív og rúsdrekka/rúsevnir so er tað eyðsæð, at børnini/tey ungu í ein ávísan mun hava hesa atgongd í Tórshavn. Tó so verður víst á frá myndugleikunum sjálvum, at serliga søla av rúsevnum ikki er miðsavnað í Tórshavn, men er at finna í fleiri økjum í landinum. Eisini vísa myndugleikarnir á, at við tað at frástøðan millum serliga miðstaðarøkið og norðara partin av landinum er somikið lítil í dag, so fáa børnini/tey ungu fatur á rúsevnum, óansæð hvar Barnaheimið er staðsett.

Í mun til frástøðuna frá heimliga umhvørvinum so er hetta ein ítøkiligur vansi, ið myndugleikarnir hava víst á. Tað kann verða trupult at viðgera eitt barn, ið er so langt heimanífrá. Tó so ger stutta frástøðan millum økini í landinum seg eisini galdandi her, og er tað tí so at siga bara fyri sunnara partin av landinum, at hetta kann kallast ein reellur trupulleiki. Hesin trupulleiki vil tó altíð verða til staðar óansæð staðseting í landinum.

Við at staðseta Barnaheimið í Tórshavn ber hinvegin til at røkka einum breiðari endamálið. Staðsetingin er fyri tað fyrsta sentral í mun til restina av landinum. Av serligum týdningi er tó atgongdin til aðrar almennar tænastur. Børnini/tey ungu, ið eru innskrivaði á Barnaheimið, hava í dag í stóran mun tørv á aðrari viðgerð afturat tí sosialpædagogisku, ið starvsfólkini á Barnaheiminum veita. Hesar tænastur eru m.a. frá psykiatriska deplinum á landssjúkrahúsinum, Sernámi, sálarfrøðingum og øðrum eindum í Almannaverkinum. Hesir myndugleikar eru allir staðsettir í Tórshavn, og eru fyrimunirnir við at staðseta Barnaheimið tætt at hesum myndugleikum tí eyðsýndir.

At velja eina staðseting sentralt í Tórshavn hevur eisini sínar orsøkir. Endamálið við Barnaheiminum er at veita børnunum viðgerð í einum heimligum umhvørvi, og at hava eina staðseting í einum sethúsaøki kemur at virka við til at børnini/tey ungu kenna seg sum ein natúrligan part av einum umhvørvi, har fólk búgva. Eisini hevur tað týdning, at børnini/tey ungu hava lutfalsliga lætta atgongd til skúla- og arbeiðslív og ikki minst frítíðarítriv og mentunarlig tiltøk, sum viðvirka til, at tey fáa eitt meira innihaldsríkt og støðugt lív á jøvnum føti við onnur børn og ung.

## Tal av børnum/ungum innskrivaði á Barnaheimið

Niðanfyri sæst eitt býti av tali av børnum á ymsar aldursbólkar fyri 2017 (tøl frá Almannaverkinum):

| | |
|---|---|
| 0 – 5 ár: | 0 |
| 6 – 10 ár: | 2 |
| 11 – 15 ár: | 9 |
| 16 – 18 ár: | 5 |
| 18 – 21 ár: | 6 |
| 21 – 23 ár: | 0 |

Tilsamans hevur talið á børnum/ungum ligið um 22 fyri 2017 (fram til juni). Tølini fyri árini frammanundan eru rættiliga meinlík hesum.

Vert er at leggja til merkis, at eins og fyri 2017 so vísa tølini fyri árini frammanundan, at so at siga ongi børn í aldrinum 0 – 5 ár verða innskrivaði á Barnaheimið. Børn í hesum aldrinum, ið verða sett heiman, fara vanliga til eina fosturfamilju at búgva. Hesi børn eru vanliga ikki viðgerðarkrevjandi á ein slíkan hátt, at neyðugt er við innskriving á Barnaheimið.

Í mun til tey ungu millum 18 og 23 ár so eru vanliga ikki nógv ung í hesum aldursbólki innskrivaði á Barnaheimið. Hetta kann tykjast sjálvsagt, av tí at talan er um eitt barnaheim, ið fyrst og fremst veitir viðgerð til børn og ung undir 18 ár, men tað er av sera stórum týdningi, at ung fólk, ið hava verið á stovni ein stóran part av lívinum, fáa eina so smidliga yvirgongd til vaksnamannalívið sum gjørligt, og tað hava verandi fysisku karmar á Barnaheiminum ikki verið viðvirkandi til. Nýggju karmarnir fara at gera tað møguligt at húsa hesum aldursbólkinum á ein hátt, ið er skræddaraseymaður til málbólkin, og sum kann tryggja lógarásetta møguleikan at veita eftirvernd. Fyri nógv ung, ið hava verið sett heiman, er eftirverndin tann avgerandi faktorurin fyri, at teirra tilvera sum vaksin eydnast.

### Børn 0 – 18 ár

Børnini hava í høvuðsheitum tørv á neyvari serfakligari viðgerð fyri sínar trupulleikar av serligum sosialum, sálarligum og psykiatriskum slag. Viðgerðin er skipað sum sonevnt sosialnámsfrøðiligt viðgerðarumhvørvi. Fyri at tryggja, at barnið fær ta viðgerð, sum tað hevur tørv á, er neyðugt, at fysisku karmarnir eru soleiðis innrættaðir, at barnið kann búgva saman við øðrum børnum, ið hava tørv á somu viðgerð.

Mælt verður til at skipað viðgerðarumhvørvið í barnabólkar. Við “barnabólkar” meinast ein bólkur av børnum, ið eru samanbærilig, tvs at tey eru um sama aldur og hava tørv á líknandi hjálp og viðgerð. Í mesta lagi 5 børn eru í sama barnabólki, og skulu hesi búgva saman í eini eind við sjálvstøðugum kømrum og við felagsrúmum av ymsum slag, sí nærri niðanfyri.
Til tess at røkka børnunum og veita ta hjálp og viðgerð, ið teimum tørvar, verður mælt til at gera 2 barnabólkar til børn 0 – 13 ár (10 børn tilsamans) og 2 barnabólkar til børn 13-18 ár (10 børn tilsamans). Í mun til tann eldra bólkin (13 – 18 ár) er umráðandi at hava í huga, at barnaverndarlógin krevur í mun til fyriskipanir til børn, ið eru fylt 16 ár, at myndugleikarnir skulu taka atlit til tey serligu viðurskifti, ið gera seg galdandi fyri henda aldursbólk, t.v.s. serliga at fyrireika barnið til eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru í tann mun, hetta er gjørligt.

**Mælt verður til at hava 4 barnabólka-eindir við 5 búeindum í hvørjum, tilsamans 20 búeindir, skipaði sum kømur við atgongd til køk og ves.**

## Ung 18 – 23 ár

Fyri henda aldursbólkin er tað serliga galdandi, at hesi er myndig, og at eitt uppihald á Barnaheiminum tí er treytað av teirra samtykki. Ung í hesum aldursbólki verða ikki innskrivaði á Barnaheimið uttan so, at tey, áðrenn tey fyltu 18 ár, vóru í eini fyriskipan sambært barnaverndarlógini. Til hesi ungu hevur barnaverndarlógin tríggjar møguleikar, alt eftir umstøðunum:
1) tann ungi heldur áfram at búgva á samdøgursstovninum (til hann fyllir 21 ár)
2) tann ungi fer í stovnslíknandi fyriskipan
3) tann ungi fer í útslúsing frá uppihaldsstaðnum
Felags fyri hesar fyriskipanir er, at endamálið er at fyrireika tann unga til eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Hesar fyriskipanir verða nevndar eftirvernd, tvs at her verður í høvuðsheitum mestur dentur lagdur á at fyrireika tann unga til eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Neyðugt er tí, at fysisku karmarnir taka hædd fyri hesum. Mælt verður tí til at skipa búeindirnar sum smærri sjálvstøðugar íbúðir heldur enn kømur og at hesar eru atskildar frá eindunum, har barnabólkarnir búgva.
Hesi ungu hava í stóran mun tørv á at læra, hvussu ein sjálvstøðug vaksnamannatilvera virkar, herundir, hvussu tað er at búgva í egnum bústaði og hava ábyrgd av hesum. Tey skulu spakuliga

kunna venja seg við at taka ábyrgd av egnum lívi. Hetta eiga fysisku karmarnir at taka hædd fyri og verða innrættaðir í mun til.

Pláss á samdøgursstovni til ung millum 18-21 ár (nr. 1 omanfyri) eiga at verða innrættaði sum sjálvstøðugar íbúðir heldur enn kømur, sum tað er mælt til í mun til barnabólkarnar (hóast talan er um eina leingjan av verandi skipan).

Við “stovnslíknandi fyriskipan” (nr. 2 omanfyri) meinast t.d. íbúð við tilknýttum vegleiðara ella varda íbúð (hetta verður ikki partur av Barnaheiminum)

Við “útslúsing frá uppihaldsstaðnum” (nr. 3 omanfyri) meinast eitt tilboð til tann unga um so líðandi at flyta út av stovninum. Tann ungi kann so yvir eitt tíðarskeið koma aftur á stovnin í t.d. 1-2 dagar í senn. Endamálið við útslúsingini er at geva tí unga møguleika fyri at halda seg uppat stovninum, har onnur ung kunnu halda seg at teirra foreldrum. Hesum eiga búeindirnar eisini at taka hædd fyri.

Um umstøðurnar hjá barninum og eindini loyva tí, skal eisini kunna bera til at nýta hesar búeindirnar til 16-18 ára gomul.

**Mælt verður til at hava 6 búeindir til málbólkin, skipaðar sum smærri sjálvstøðugar íbúðir.**

## Familjur

Endamálið við at innskriva familju til familjuviðgerð er at styrkja foreldraførleikan hjá foreldrunum við ráðgeving og vegleiðing og at veita familjuviðgerð annars í mun til tørvin hjá familjuni.

Í dag eru bara 2 íbúðir á barnaheiminum til familjur. Sambært barnaverndartænastunum, sum gera tilmæli sambært lógini, og HBVN, sum tekur avgerðir um innskriving av bæði børnum og familjum á barnaheimið, so er hetta alt ov lítið. Tá talan er um at børn verða sett heiman orsaka av umsorganarsvíki er tað alneyðugt at styrkja tann fyribyrgjandi partin, soleiðis at so fá børn sum gjørligt verða sett heiman. Í hesum sambandi eru fleiri pláss til familjur á barnaheiminum avgerandi. Á henda hátt ber til at lofta familjuni sum eini heild og tryggja, at trupulleikarnir, ið familjan hevur at dragast við, verða loystir saman við familjuni á staðnum.

Samdøgursviðgerð av familjum varðar vanliga 4 mánaðir við møguleika fyri leingjan. Dagviðgerð verður eisini bjóða familjum, sum hava fingið viðgerð á stovninum. Dagviðgerð er skiftivís úti í heiminum og hjá familjunum og familjur koma inn til samrøður og vegleiðing.

**Mælt verður til at hava 10 familju-búeindir skipaðar sum størri og smærri sjálvstøðugar íbúðir umframt felagshøli til dagviðgerð v.m.**

## *Skermaðar íbúðir og samveru-íbúð*

Afturat omanfyrinevndu búeindum (vanlig kømur og íbúðir) verður eisini neyðugt at byggja 3 íbúðir, ið burturav eru ætlaðar til serligt endamál. Hesar verða innrættaðar í mun til endamálið við uppihaldinum, og skulu ikki kunna nýtast til annað virksemi, heldur ikki sum vanligar búeindir.

### Skermaðar íbúðir

Fyri at røkka endamálinum við uppihaldinum á einum stovni sum barnaheiminum kann tað viðhvørt verða neyðugt at halda barninum inni í einrúmi í styttri ella longri tíðarskeið, serliga tá talan er um umstøður, har barnið sjálvt er í vanda ella kann seta onnur á stovninum í vanda, ella tá umstøðurnar hjá barninum/tí unga gera, at neyðugt er at vera fyri seg sjálvan í eitt ávíst tíðarskeið. Talan er um íbúð við kamari, vesi og rúmi til starvsfólk við te-køki.

**Mælt verður til at hava 2 skermaðar íbúðir, ið skulu liggja í í móttøkueindini ( sí nærri lýsing niðanfyri)**

### Samveru-íbúð

Barnaverndarlógin ásetur, at børn, ið eru umsorganaryvirtikin, og búgva á samdøgursstovni, hava rætt til samveru við foreldrini. Tað er HBVN, ið tekur støðu til, hvussu samvera skal skipast í málum, tá barnið er umsorganaryvirtikið. Vanligt er, at børn og foreldur hava samveru. Til ber at hava samveru í vanligu búeindini hjá barninum, men í ávísum førum kann tað verða neyðugt, at samveran fer fram í einari serligari samveru-íbúð, td um foreldrini koma langvegis frá og skulu gista, tá tað ikki ber til at hava samveruna, har onnur børn/ung búgva og tá samveran er undir eftirliti.

**Mælt verður til at gera eina íbúð við alrúmi og kamari við plássi til 1 barn og 2 vaksin. Ìbúðin er partur av Familjueindini og íroknað teim 10 búeindunum har.**

## Móttøkueind

Í dag verða øll nýggj børn innskrivaði á móttøkudeildina í eind 10 áðrenn tey verða flutt víðari til teirra "stovnspláss". Endamálið við uppihaldinum í móttøkudeildini er at útgreinað viðgerðartørvin nærri og at finna útav, hvønn barnabólk og stovn barnið fær bestu menningarmøguleikar saman við. Eisini verður fyrsta tíðin á móttøkudeildini brúkt til at læra barnið at fylgja einum vanligum gerandisdegi, at sova um náttina, at eta saman við øðrum og at fylgja eini skúlaaundirvísing.

Í dag er tað ein trupulleiki, at móttøkudeildin og hinar deildinar á Barnaheiminum eru spjaddar kring Tórshavn og tískil verður barnið ella tann ungi í ov stóran mun fluttur óneyðuga nógv. Bólkurin mælir tó til, at móttøkudeildin verður varðveitt sum partur av nýggja Barnaheiminum. Á henda hátt verður møguleiki fyri at fáa eina betri útgreining av tørvinum og barnið sleppur samstundis undan at flyta á annan stovn, men heldur í aðra eind.

Av tí at børn og ung oftast eru sera illa fyri, og fyrsta tíðin merkt av nógvari ørkymlan/sorg um at verða sett heiman, sum ávirkar atburðin hjá teimum, verður mælt frá, at børnini og tey ungu fara beinleiðis út í eindirnar. Á tann hátt verður einstaka barnið vart fyri óneyðuga nógvum flytingum og viðgerðartilboðið kann í størri mun tillagast tørvinum hjá tí einstaka barninum. Harumframt er størri møguleiki fyri at verja børnini, sum hava verið innskrivaði í longri tíð og eru komin á ein av hinum barnabólkunum at búgva, ímóti at uppliva ógvusliga atferð, sum er orsakað av tí ørkymlan, sum nýggju børnini aloftast hava.

**<u>Bólkurin mælir til, at móttøkueindin hevur 4 kømur við atgongd til vesi - umframt 2 skermaðar íbúðir.</u>**

## Nærri útgreining av rúmum og eindum.

### Móttøkueindin:

2 kømur á 15 fermetrar, deilast um 1 vesi við brúsu

2 kømur á 15 fermetrar við vesi við brúsu

1 alrúm, sum gongur í eitt við køkin. Í alrúminum verður matarborð, sum skal standa frítt soleiðis, at lætt er at fara frá borðinum, tá kenslurnar taka ræði á barninum. Barnið skal ikki reka seg í lutir ella fólk. Alrúmið skal hava sansastimbrandi umhvørvi - holukent - og eggja til samveru. Møguleiki skal vera fyri at lesa tekniseriur, spæla borðspøl og hyggja í sjónvarp saman í eini sofu í einum króki.

Samanumtikið ein heimlig stova, har rúm skal vera fyri, at øll 4 børnini og 2-3 starvsfólk kunnu verða "heima" samstundis. Bøkur og bløð. Minimum tvær hurðar út úr køk/alrúminum út í annað felagsrúm. (Rýmingarleið í samband við harðskap)

1 lítlan køk við:

- Køksoyggj. Starvsfólk skal hava andlitið út móti børnunum, sum eru í alrúminum. Børn og ung, sum hava verið fyri umsorganarsvíki, skanna støðugt andlitið á vaksnum fyri at vita, um alt er trygt.
- Kókiplátur, ovnur + mikroovn, roykhetta. Baka køku og hita okkurt upp, um børn hava tørv á tí, uttanfyri vanligar matartíðir.
- Innbygd "ísvatnmaskina", eggjandi hjá børnum og ungum at drekka vatn.
- Matkova/fluguskáp, sum hongur uttaná húsinum og sum er eitt skáp inni í køkinum.
- Uppvaskimaskina, køliskáp og lítið frystiskáp.
- Skáp til vanliga húsarhaldsreingerð

1) Lítil skrivstova til starvsfólk og samtalurúm. Pláss skal vera fyri teldu og til at starvsfólk kunnu skriva dagbók/skjalfesta dagligu viðgerðina og støðuna hjá tí einstaka barninum. Rúm skal vera fyri, at 3 starvsfólk kunnu vera á skrivstovuni samstundis t.d. tá vaktarskifti er. Á skrivstovuni skal eisini vera skáp til heilivág, sum skal kunna læsast. Talvur, sum lýsa gerandisdagin, avtalur og uppgávur. Pappír og mappur skulu kunna læsast inni í skápi. Skáp til taskur o.a. hjá starvsfólkum. Lás á hurðini. Pláss til eina sovisofu, sum starvsfólk kunnu sova á. Gott um ein dragihurð kann verða í hølinum, soleiðis, at rúmið kann býtast upp, tá ein samrøða skal verða ella starvsfólk skal sova.
2) Vesi til starvsfólk.

## Skermaðar íbúðir

Mælt verður til at bygdar verða 2 sokallaðar skermaðar íbúðir.

<u>Hvør íbúð skal hava:</u>

- Eitt kamar. Eitt lítið kamar, bert pláss til eina song, sum er innbygd.
- Lítil vindeygu, sum ikki slepst út ígjøgnum. Tvey ella trý stykkir, alt eftir, hvat er neyðugt fyri, at tað ikki skal kennast ov innistongt. Glasið skal ikki kunna brotnað. Tó neyðugt við rýmingarleiðum í sambandi við eld og tá atburður gerst ov vandamikil.
- Eitt lítið vesi við hondvaski og brúsu. Onki annað inni í rúminum. Eitt lítið vindeyga heilt uppi undir loftinum og tað skal ikki bera til at sleppa út. Glasið skal ikki kunna brotna. Tó neyðugt við rýmingarleiðum í sambandi við eld og tá atburður gerst ov vandamikil.
- Eitt rúm til starvsfólk. Møguleiki fyri at bryggja te og kaffi, vaska hendur. Pláss til tveir hvílustólar og ein vanligan stovustól. Talan kann vera um, at starvsfólk skal sita í nógvar tímar.
- Einki annað skal verða inni.
- Eyka ljóðdoyving er neyðug.
- Íbúðirnar kunnu við fyrimuni byggjast í móttøkueindini. Soleiðis kunnu eyka starvsfólk brúkast, og ikki er langt “heimani ífrá“.

## 4 Bú- og viðgerðareindir til børn og ung

## *Tveir barnabólkar í aldursbólkinum 0-13 ár.*

**Hvør bólkur, sum eru 5 børn, skulu hava fylgjandi rúm:**

3) 5 kømur á 15 fermetrar (1 kamar skal rúma barni við fjølbreki)
4) 2 vesi við brúsu
5) 1 vesi við brúsu og baðikar (skal rúma barni við fjølbreki)
6) 1 alrúm, sum gongur í eitt við køkin. Í alrúminum verður matarborð, sum skal standa frítt soleiðis, at lætt er at fara frá borðinum, tá kenslurnar taka ræði av barninum. Barnið skal ikki

reka seg í lutir ella fólk. Alrúmið skal hava sansastimbrandi umhvørvið - holukent - og eggja til samveru. Møguleiki skal vera fyri at lesa tekniseriur, spæla borðspøl og hyggja í sjónvarp saman í eini sofu í einum króki.
Samanumtikið ein heimlig stova har rúm skal vera fyri at øll 5 børnini og 2-3 starvsfólk kunnu verða "heima" samstundis. Bøkur og bløð. Minimum tvær hurðar út úr køk/alrúminum út í annað felagsrúm. (Rýmingarleið í samband við harðskap)

7) 1 lítlan køk við:
   - Køksoyggj. Starvsfólk skal hava andlitið út móti børnunum, sum eru í alrúminum. Børn og ung sum hava verið fyri umsorganarsvíki, skanna støðugt andlitið á vaksnum, fyri at vita um alt er trygt.
   - Kókiplátur, ovnur + mikroovn, roykhetta. Baka køku og hita okkurt upp, um børn hava tørv á tí, uttanfyri vanligar matartíðir.
   - Innbygd "ísvatnmaskina" eggjandi hjá børnum og ungum at drekka vatn.
   - matkova/ fluguskáp, sum hongur uttaná húsinum og sum er eitt skáp inni í køkinum.
   - Uppvaskimaskina, køliskáp og lítið frystiskáp.
   - Skáp til vanliga húsarhaldsreingerð

8) Lítil skrivstova til starvsfólk og samtalurúm. Pláss skal vera fyri teldu og til, at starvsfólk kunnu skriva dagbók/skjalfesta dagligu viðgerðini og støðuna hjá tí einstaka barninum. Rúm skal vera fyri, at 3 starvsfólk kunnu vera á skrivstovuni samstundis t.d. tá vaktarskifti er. Á skrivstovuni skal eisini vera skáp til heilivág, sum skal læsast. Talvur, sum lýsa gerandisdagin, avtalur og uppgávur. Pappír og mappur skulu kunna læsast inni í skápi. Starvsfólk skal kunna leggja tasku í skápinum. Lás á hurðini. Pláss til eina sovisofu, sum starvsfólk kunnu sova. Gott um ein dragihurð kann verða í hølinum, soleiðis, at rúmið kann býtast upp tá ein samrøða skal verða ella starvsfólk skal sova.
9) Vesi til starvsfólk. Vesi kann, saman við lítli skrivstovuni, liggja uttarlaga í hvørji bú- og viðgerðareind, tætt at felagshølunum, sum vónandi verður mitt í stovninum.

- Alneyðugt, at tað ikki trongt og smalt at koma til og frá kamarinum.
- Kømur skulu hava hurð út í alrúmið, í hvørjari bú- og viðgerðareind, men ikki út í tún.

- Minimum tvær hurðar út úr køk/alrúminum og út á terassu ella út í annað felagsrúm. (Rýmingarleið tá harðskapur er)
- Hurðar úr starvsfólkarúminum/samtalurúminum fyri trygd hjá børnum og starvsfólki.
- Klæðir verða vaskaði í felags vaskarínum.

**Kømur:**

Hvørt kamar er 15 fermetrar og skal innrættast eftir, hvør býr í kamarinum. Ikki neyðugt, at øll kømur eru eins.

Sum eitt minsta krav skal vera:

- Song.
  - Skal standa føst.
  - Boksmadrassur verða keyptar eftir tørvi.

- Skrivaraborð
- Hillar, sum eru fast bygdar
- Klædnaskáp, innbygd og brúkast sum ljóð doyving millum kømur
- Hurð, sum kann steingjast
- Stórt vindeyga
- Ljóðdoyvandi tilfar er neyðugt
- Møguleiki fyri ljósi um náttina
- Internet atgongd í hvørjum kamari, men ikki sjónvarp
- Dømi um, at kømur kunnu vera ymisk:
  - Song uppi í hædd, við skuffum undir
  - Songin kann vera ein hola í vegginum
    - Børn sum hava verið fyri kynsligum ágangi/misnýtslu kunnu fáa ein lætta, bara tí at songin og kamarið er heilt øðrvísi enn tað sum tey hava verið von við
  - Ein “leysur” klatriveggur at koma upp í songina
  - Heingikoyggjur
  - Eitt prinsessu kamar

*Tveir barnabólkur í aldursbólkinum 14 ár og eldri.*

**Hvør bólkur skal hava fylgjandi rúm:**
5 kømur á 15 fermetrar + vesi við brúsu (eitt kamar og eitt vesi skal skjótt/lætt kunna umskapast til eitt barn við fjølbreki)

10) 1 alrúm, sum gongur í eitt við køkin. Í alrúminum verður matarborð, sum skal standa frítt soleiðis, at lætt er at fara frá borðinum, tá kenslurnar taka ræði av barninum. Barnið skal ikki reka seg í lutir ella fólk. Alrúmið skal hava sansastimbrandi umhvørvið og eggja til samveru og hugna í bólki. Møguleiki skal vera fyri at lesa, spæla borðspøl og hyggja í sjónvarp saman í eini sofu í einum króki.
    Samanumtikið ein heimlig stova har rúm skal vera fyri, at øll 5 børnini og 2-3 starvsfólk kunnu verða "heima" samstundis. Pláss fyri bókum/bløðum.
    Minimum tvær hurðar út úr køk/alrúminum út í annað felagsrúm. (rýmingarleið í samband við harðskap)
11) 1 lítlan køk við:
    - Køksoyggj. Starvsfólk skal hava andlitið út móti børnunum, sum eru í alrúminum. Børn og ung, sum hava verið fyri umsorganarsvíki, skanna støðugt andlitið á vaksnum, fyri at vita um alt er trygt.
    - Kókiplátur, roykhetta, ovnur + mikroovnur. Baka køku og hita okkurt upp, um børn hava tørv á tí, uttanfyri vanligar matartíðir.
    - Innbygd "ísvatnmaskina" eggjandi hjá børnum og ungum at drekka vatn.
    - matkova/ fluguskáp, sum hongur uttaná húsinum og sum er eitt skáp inni í køkinum.
    - Uppvaskimaskina, køliskáp og lítið frystiskáp.
    - Skáp til dagliga húshaldsreingerð

- 11) Lítil skrivstova til starvsfólk. Pláss skal vera fyri teldu og til, at starvsfólk kunnu skriva dagbók/skjalfesta dagligu viðgerðini og støðuna hjá tí einstaka barninum. Rúm skal vera fyri, at 3 starvsfólk kunnu vera á skrivstovuni samstundis t.d. tá vaktarskifti er. Á skrivstovuni skal eisini vera skáp til heilivág, sum skal læsast. Talvur, sum lýsa gerandisdagin, avtalur og uppgávur. Pappír og mappur skulu kunna læsast inni í skápi. Lás á hurðini. Starvsfólk skal

leggja stongja tasku í skápinum. Lás á hurðini. Pláss til eina sovisofu, sum starvsfólk kunnu sova. Gott um ein dragihurð kann verða í hølinum, soleiðis, at rúmið kann býtast upp tá ein samrøða skal verða ella starvsfólk skal sova.

12) Vesi til starvsfólk. Vesi kann, saman við lítli skrivstovuni, liggja uttarlaga í hvørji bú- og viðgerðareind, tætt at felagshølunum, sum vónandi verður mitt í stovninum.

Hvørt kamar skal innrættast eftir, hvør býr í kamarinum. Øll kømur nýtast ikki at vera eins. Hvørt kamar skal tó sum minimum hava:

- Song
  - Song uppi í hædd við skuffum undir
  - Songin kann vera ein hola í vegginum
- Skrivaraborð
- Hillar og skáp
- Hurð, sum skal kunna stongjast
- Vindeyga
- Ljóðdoyvandi tilfar er neyðugt
- Møguleiki fyri ljósi um náttina
- Internet í hvørjum kamari, men ikki sjónvarp.

Alneyðugt, at tað ikki trongt og smalt at koma til og frá kamarinum.
Kømurini skulu hava hurð út í alrúmið, í hvørjari bú- og viðgerðareind, men ikki út í tún.

Minimum tvær hurðar út úr køk/alrúminum út í annað felagsrúm. (rýmingarleið í samband við harðskap)

Børn yvir 14 ár vaska klæðir í felags vaskirúminum í høvuðsbygninginum.

## Eftirverndareindin

### *6 íbúðir til eftirvernd:*

Ìbúðirnar eiga í støðd at verða sum ein lestraríbúð ti 1 persón (33 fermetrar)

Hvør íbúð skal hava:

- 1 kamar/stova (20 fermetrar)

- 1 vesi við brúsu (dragihurð millum kamar og vesi) (7 fermetrar)
- Ein lítlan køk við kókiplátum, køliskápi, ovni, elketil/kaffimaskinu (thekøk í inngongd 6 fermetrar)
- Egin inngongd.
- Internet og sjónvarp í hvørjari íbúð.
- Tey ungu vaska klæðir í felags vaskirúminum í høvuðsbygninginum.
- Tey ungu skulu kunna gera mat í egnari íbúð og skulu eisini hava møguleika fyri at fáa meira ella minni gjørdan mat frá stórkøkinum.

Familjueindin

## *10 íbúðir til familjuviðgerð – herav 1 til samveru*

- 1 íbúð við 3 kømurum, alrúmi við lítlum køki og vesi. Familjan skal gera mat og hava vanligt húsarhald. Áleið 80 fermetrar.
- 2 íbúðir við 2 kømurum, alrúmi við lítlum køki og vesi. Familjan skal gera mat og hava vanligt húsarhald. Áleið 60 fermetrar.
- 3 íbúðir við kamari, vesi og alrúmi við thekøki. T.d. ungar kvinnur við smábørnum, sum gera mat í felagskøkini. (40 fermetrar)
- 3 íbúðir við alrúmi við sovisofu, vesi og thekøki (35 fermetrar)
- Internet og sjónvarp í hvørjari íbúð.
- Felags køk til tær 7 íbúðirnar, sum ikki hava køk.
    - Kókiplátur
    - Ovnur
    - Mikroovnur
    - Uppvaskimaskina
    - Køliskáp við frystiskápi
    - Matarborð

## *Samveru íbúð.*

1 íbúð, sum er 40 fermetrar og hevur fylgjandi:

- Kamar. Hjúnasong (120 cm) og børn (koyggisong)
- Vesi við brús

- Alrúmi við thekøki
    - Sovisofa
    - Sjónvarp
    - Ein lítil spælikrókur
    - Spísiborð
    - Møguleiki at baka ella gera ein lítlan døgurða

Samspælsrúm við sansalutum (30 fermetrar)

2 samtalurúm við plássi fyri trimum fólkum (á 8 fermetrar)

- Fundarhøli við plássi fyri 12 fólkum (35 fermetrar)

  Barnaverndartænastur, starvsfólk, foreldur, sálarfrøðingur og sakførarar hava javnan fund á Familjudeplinum. Neyðugt at hava rúm fyri, at nógv fólk kunnu tosa saman uttan at vera órógvaði.

  Familjudepilin má hava eitt tílíkt rúm, sum tey altíð hava atgongd til. Hetta kann samstundis vera starvsfólkarúm, har starvsfólk hava sínar arbeiðsteldur.

Undirvísingarhølið til familjuskúla/dagviðgerð (35 fermetrar)

- Pláss fyri 6 børnum og 9 vaksnum samstundis.
- Talvur at skriva -whiteboard
- Børn gera skúlating, tey baka, mála og eru virkin, meðan starvsfólk vegleiða foreldrum at geva sínum børnum mennandi umstøður. Nøkur børn, sum eru á Barnaheiminum, fáa heimaundirvísing, tí tey megna ikki at fara í skúla.
- Møguligt er at brúka verkstøð og annað, sum eisini er partur av nýggja barnaheiminum. Tí skal hetta undirvísingarhølið liggja tætt við teimum ymisku verkstøðunum/ hobby rúmum
- Góð fyribyrging at umsorganaryvirtaka børn.
- Goymslurúm til borð/stólar, sum verða brúkt tá størri felags tiltøk so sum jólahald, starvsfólkafundir, sjónleikur os.fr. eru.

Familjurnar vaska klæðir á felags vaskarínum, meðan tey eru á Barnaheiminum (nærri lýst niðanfyri)

## Felags hølir/funktiónir til Barnaheimið (Høvuðsbygningurin)

### *Skrivstova/fyrisiting.*

Leiðslan í Eind 10/Barnaheiminum telir í dag ein eindarleiðara og tveir leiðarar. Eindarleiðarin hevur í dag skrivstovu í høvuðssætinum hjá Almannaverkinum, meðan leiðararnir hava skrivstovu á stovninum.

Bólkurin mælir til, at nýggja Barnaheimið hevur 2 leiðsluskrivstovur til leiðararnar og skrivstovuhølir til fyrisiting/sosialráðgeving.

Leiðsluskrivstovan eigur at hava skrivaraborð, fundarborð, skáp/skuffir til skjalfesting (meginparturin av skjølum verða goymd á landsskjalasavninum). Hvør skrivstovan eigur at vera 10 fermetrar.

Harumframt skal skrivstova verða til roknskaparfólk og sosialráðgevan, sum starvast á barnaheiminum. Hesi skulu eisini hava skrivstovu við hvør sínum skrivaraborði, skuffu/skápi v.m. Bókasavn hjá starvsfólki – leita sær nýggja vitan um "viðgerð". Hesi høli eiga at vera áleið 20 fermetrar.

Starvsfólkahøli til (9-10 fólk – 20 fermetrar) við lítlum køki – við mikroovni, ketil/kaffimaskin, matarborðið 20 og vesi (5 fermetrar) til starvsfólkini eigur at verða í skrivstovueindini.
Skiftingarrúm, sum er lógarkrav, til starvsfólk.

**<u>Mælt verður til, at skrivstovueindin liggur nær høvuðsinngongini í høvuðsbygninginum.</u>**

### *Aktivivetsrúm/venjingarrúm/rørslurúm*

Umframt at skapa tryggar og dygdargóðar karmar um búpartin hjá børnunum, so hevur tað eisini alstóran týdning, at børnini fáa møguleika at hava ein aktivan gerandisdag, sum viðførir, at barnið støðugt kann mennast. Eind 10 hevur víst á, at tað er sera umráðandi at karmar verða fyri, at eldri børnini fáa møguelika fyri at fáa pulsin upp soleiðis, at "aggressiónir" kunnu fáa luft við at brúka

kroppin v.m. (High arrousal). Tí mælkir bólkurin til, at tað á Barnaheiminum verður rúmd fyri at hava venjingarhølir og rørslurúm/spælirúm har eini 5-7 børn kunnu vera samstundis.

Hinvegin eru eisini nøkur børn, sum í størri mun hava tøv á ”sansadoyvandi” aktiviteum (low arrousal) sum hevur til endamáls at fáa kroppin/sinnið í ró og fri. Hetta kann t.d. gerast við sansarúmi.

Harumframt hevur tað eisini týdning, at børnini/tey ungu fáa møguleika fyri, at gera okkurt/framleiða eitthvørt, sum gevur meining fyri tey og onnur. Tí eigur ”hobbyrúm” at vera á Barnaheiminum har rúm er fyri at mála, at seyma, gera leir, perlur os.fr. Týdning at umstøður er at goyma tilfarið í skápum v.m. at vask er í rúminum til at skola penslar, leir v.m.

- Venjingarrúm: 5 – 7 venjingartól/maskinur, bóltar, sum fáa ”pulsin” hjá børnunum/teim ungu upp. (rúm fyri 5-7 maskinur, bóltar, máttur – pulsin upp - liggur í forleingilsi av rørslurúmi – sansirúm (30 fermetrar)
- Rørslurúm (high arrousal): Innandurða spælipláss/”tumlerum” (30 fermetrar)
- Sansarúm (low arrousal – litir/ljós/ljós/vatnsong/gosbaðaktivitetsrúm (30 fermetrar)
- Aktivitetsrúm (smá verkstøð – skáp/gólv – seymistova/perluverkstað/máling/leir/) (50 fermetrar)

## *Felags tiltøk*

Bólkurin mælir til, at hugsa verður um støður - tað verið seg hugnakvøld, størri føðingardagar, jólahald ella kunningarfundir - har øll børn, ung og familjur og starvsfólk eru samlaði samstundis. Tað kunnu t.d. verða tiltøk har áleið 100 fólk skulu sita/standa í sama rúmi samstundis. Tað er ikki skynsamt at brúka so stóran part av barnaheiminum til eitt felagshølið, sum verður brúkt so sjálvdan. Hinvegin er tað eisini óskynsamt og óheimligt at fara út at leiga hølir til t.d. jólahald. Tí eiga tey stóru rúmini á barnaheiminum t.d. undirvísingarhølir og fundarhølir at kunnu leggjast saman, tá tørvur er á tí.

Starvsfólkini á Barnaheiminum eru í løtuni áleið 50 fólk. Tey eru sjálvsagt ikki øll til arbeiðis samstundis. Felags starvsfólkfundur er einaferð um vikuna. Ynskiligt er, at starvsfólkafundir framyvir

koma at verða hildnir á barnaheiminum. Bólkurin metir, at tað átti at verið møguligt at skipað soleiðis fyri, at felagshølini kunnu opnast soleiðis, at øll kunnu rúmast her. Týdning at hugsa verður um, at stólar og borð kunnu goymast burtur av vegnum og at nøktandi teknisk útgerð /sum t.d. í skúlastovuni – er til taks.

### *Matgerð*

Lýsingin omanfyri vísir, at tað verða smáir køkar í einstøku íbúðunum og eindunum.
Eind 10 mælir til, at tað verður ein stórkøkur og stór matargoymsla á Barnaheiminum.
Orsøkin er, at tað eru nógv og ymisk børn/ung/familjur á barnaheiminum og mett verður, at tíð og orka hjá eitt nú námsfrøðignum eigur at verða brúkt til sosialnámsfrøðiliga viðgerð heldur enn innkeyp og matgerð v.m. tó at matgerð og innkeyp tað í ávísum førum er partur av viðgerðini.
Rúm skal verða fyri, at eini 3 fólk kunnu arbeiða í køkinum samstundis.
Eind 10 metir, at matur skal gerast til eini 50 børn/ung/familjur umframt starvsfólk dagliga og skal køkurin góðkennast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
Mett verður, at køkurin eigur at vera áleið 50 fermetrar.

Nógv kann sparast um Barnaheimið keypir stórt inn. Barnaheimið fær nógvan fisk ókeypis frá skipum kring landið og eisini verður kjøt keypt um heystið eins og í øðrum føroyskum heimum.

Tankin er, at eindirnar bíleggja matin frá høvuðskøkinum og at maturin kann vera meira ella minni liðugur at seta á borði. Fólk frá eindunum koma so eftir matinum.

Bólkurin mælir til, at stórkøkurin liggur á veghædd og miðskeiðis í húsinum soleiðis, at matroykur v.m. kemur runt húsið og at tað er lætt hjá øllum eindum at koma eftir matinum.

### *Klædnavask og reingerð*

Størri felags vaskirúm har møguleiki er fyri at vaska og turka klæðir - inni og úti. (Áleið 40 fermetrar)
Eigur at liggja í veghædd í felagshølinum.
Mælt verður til, at tað eru 6 industrivaskimaskinur og 3 turkitrumlir.

Stórt borð at leggja klæðir saman á.
Vask

Reingeraðarrúm/vaskikjallari við vaski, krana og hyllum til t.d. reingerðarevni. Pláss skal vera fyri reingerðarvogni og reingerðarvørum og at starvsfólk eisini er í hølinum. Bólkurin metir, at tað er best at hava eitt rúm á hvørjari hædd.  Hvørt rúm eigur at vera áleið 8 fermetrar.

### *Goymslurúm av ymiskum slagi:*

Matargoymsla (skal vera lætt at koma til og frá við vørum – keypa stórt inn) (15 fermetrar)
Hjallur til kjøt, sum verður keypt og fæst sum gávur (10 fermetrar)

Hita rúm:

- Súkklur
- Barnavognar

Klæðir hjá børnum, ungum og familjum (ùti í eindunum – helst á kamarinum/íbúðini)

Seingjarklæðir/handklæði v.m. (úti í eindini ella á vaskarínum)

Jólapynt v.m.

Amboð

### *Tøknirúm:*

elinstillatiónir v.m.

### *Uttanumøkið:*

- Afturlatið rúm skal gerast til skrellikontainarar, fyri at umganga rottur.
- 20 Parkeringspláss (2 til koyristól)
- Spælipláss
- Grillpláss
- Úti skal vera sanastimbran og rørsla.
- Náttúra og tilevnað rørslu og sansa lutir við gróti og vatni.
- Hitapottar og bálpláss og uttandura ljóðføri
- Nógv støð at finna lívd
- Vakstrarhús og vøkstur

### *Snildtøkni*

Snildtøkni verður umrøtt við bygginevndina, sum m.a. eigur at taka støðu til, um tað er neyðugt við tráðleysari ljós og hitastýring.

Vísandi til tryggleika hjá børnum, ungum, familjum og starvsfólki mælir bólkurin til, at trygdar- og ávaringarskipanir verður hugsaðar inn í bygningin beinanvegin.

Bólkurin mælir til, at alarmskipanir vera á øllum vindeygum og hurðum, sum tó kunnu slásst frá í pørtum. Starvsfólk skal hava alarm á sær alla tíð.

Allar hurðar skulu hava lás, sum kunnu læsast og opnast við chippi, sum starvsfólk, famlijur, ung og børn fáa, tá tey koma á Barnaheimið.
Møguligt skal vera hjá starvsfólki at læsa hurðar, tá hetta er neyðugt.

Innbygdur støvsúgvari – men tá er umráðandi, at hugsa verður um goymslu av slangu v.m.

### *Yvirflatur*

Í vátrúmum skal vera slætt vátrúmsloft.

Í øðrum rúmum skal vera ljóðregulerandi loft.

Gólvklæðing, veggfasadur og litir verða ásett í samstarvi við bygginevndina.
Ristir á vesinum, sum skal kunna spulast, og slanga frá brúsu skal røkka til vesikummu
Rist í í gólvinum í stórkøkinum- so tað kann spulast

Litir í kømurum, íbúðum og felagshølum skal svara til litir, ið verða nýttir í privatum heimum, og ikki litir, ið einans eru at síggja í almennum bygningum.

Grafittimáling ella onnur máling, ið ikki kann málast útyvir, skal ikki nýtast.

Børn, ung og famlijur skulu kunna seta sín egna dám á kamar, íbúð og í ein ávísan mun felagshølini, meðan hesi á Barnaheiminum.

## *Onnur atlit*

Byggitekniskar loysnir, ið góðar royndar eru við í Føroyum skulu nýtast, eins og tilfar, ið er kent og sum góðar royndir eru við, skal nýtast.

Góðir og hóskandi karmar innandura skulu raðfestast fram um sniðgeving og dýrar arkitektoniskar loysnir og kompliserað snið.

Verður neyðugt at byggja í hæddum, skal elevator verða á barnaheiminum.

Hurðar skulu verða nóg breiðar til koyrstólsbrúkarar og starvsfólk

Glas (vindeygu/spegl) skal smildrast, um tað brotnar, hetta fyri trygdina hjá børnum/ungum og starvsfólki

Møguligir ivaspurningar og serligar avgerðir skulu takast upp við bygginevndina.

## Virksemið á Barnaheiminum.

Sum lýsingin av málbólki og tørvi vísir, so er virksemið á Barnaheiminum fjøltáttað og samansett. Hetta setir stór og í ein ávísan mun mótsatrættaði krøv til bygningin og umhvørvið - í og rundanum bygningin.

Málið er at skapa eitt fyri børnini, tey ungu og familjurnar trygt, heimligt og dygdargott fakligt sosialnámsfrøðiligt bú- og viðgerðartilboð. Umhvørvið skal verða skipað í tráð við tað, sum í lærubókum verður kallað miljøterapi. Hetta skal síggjast aftur í bygningi og uttanumøkinum. Sansastimbran og rørsla – tað verið seg rimar á einum veggi í køkinum, eina heingikoyggju í alrúminum, skreiðibreyt saman við trappum ljós - skal hugsast inn í alt húsið. Børnini og tey ungu hava ofta torført við at kenna og viðurkenna seg sjálvan. Tí er gott at hava nógv og stór spegl runt í húsinum, sum eru viðvirkandi til identitetsmenning hjá børnum og ungum. Eisini skal hetta hugsast inn í økið rundanum Barnaheimið.

Samstundis skulu atlit eisini takast til at skapa eitt heimligt, trygt og róligt umhvørvið soleiðis, at børnini og tey ungu kenna seg trygg og at tey eru partur av einum felagsskapi á barnaheiminum. Hetta verður gjørt við m.a. at byggja soleiðis, at smáir bólkar og eindir, kunnu hava sítt egna umráði bæði inni og úti. Dentur skal verða lagdur á so vítt gjørligt at brúka ljóð- og ljósdoyvandi tilfar og innbúgv.

Í mun til innbúgv - so eigur Barnaheimið so vítt gjørligt at hava dygdargott innbúgv, sum tolir, at nógv og ymisk fólk dagliga búleikast inni og úti. Eisini skal tað verða lætt at halda og gera reint. Dentur eigur tó eisini at verða lagdur á at hava innbúgv v.m. sum líkist tí ein vanlig familja hevur í heimi sínum. Atlit skulu takast til litir og dentur eigur at verða lagdur á at skapa eitt heimligt og hugnaligt umhvørvið soleiðis, at børnini og tey ungu trívast og kenna at hetta er teirra heim so longi tey eru har.

Bygningurin eigur at verða bygdur soleiðis, at rúm er fyri fleksibiliteti og stabiliteti samstundis. Í høvuðsbygninginum eiga øll stór rúm og felagsrúm at hava veggir, sum kunnu flytast soleiðis, at rúm er fyri at broyta rúmini alt eftir, hvat virksemið skal vera har. Hugsast skal, at alt skal kunna brúkast til minst tvey endamál. Rúm eigur eisini at verða fyri, at øll á barnaheiminum eru samlaði t.d. jólahald, kunningarfundir ella annað, sum nú einaferð fer fram á slíkum stovnum.

Baðirúmini skulu vera lætt at reingerða og skulu ikki vera ”køld og gløtt” og skulu halda í langa tíð. Ein góð loysn er helst sveisað vinyl, sum er langtíðarhaldbært og kann spulast.

Sosialnámsfrøðiliga viðgerðarumhvørvið skal vera soleiðis, at virksemið kann skipast í sjálvstøðugar smáar tryggar barnabólkar, eftirverndareind og familjueind, sum tó verða bundin saman við høvuðsbygninginum, sum verður hjartað á barnaheiminum.

Barnabólkarnir 0-13 ár eiga at liggja í veghædd t.v.s. um bygt verður í tveimum hæddum, eiga hesi kømur og tey rúm, sum eru knýtt at einstaka bólkinum at vera á niðastu hædd. Fyri at skapa eitt heimligt umhvørvið og fyri at halda virkseminum í barnabólkunum atskilt frá øðrum virksemi á Barnaheiminum, skal inn/útgongd verða til eindina. Børnini og starvsfólk skulu kunna fara inn og út av eindini uttan at noyðast gjøgnum hinar eindirnar. Tó skulu bæði børn og starvsfólk eisini hava atgongd til og frá høvuðsbygninginum uttan at fara út.

Barnabólkarnir 14 ár og eldri kunnu - um neyðugt - liggja á 1.hædd um bygt verður í tveimum hæddum. Ein møguleiki er, at hesir bólkar liggja omaná barnabólkar 0-13 ár, men hava sína egnu inngongd, sum eigur at liggja hinumegin inngongdina hjá teim yngru børnunum. Børnini og starvsfólkini skulu tó hava møguleika fyri at fara beinleiðis inn og út úr eindini til høvuðsbygningin uttan at noyðast út.

Eftirverndareindin eigur at liggja soleiðis fyri, at tey ungu við tíðini fáa eitt alt meira sjálvstøðugt lív við so lítlari hjálp sum gjørligt. Nøkur ung koma beinleiðis inn í hesar íbúðir, men meginparturin av teim ungu hava verið í viðgerð á barnaheiminum og eru ávegis lívinum uttanfyri barnaheimið. Tey ungu skulu ikki at verða slept á fjall, men hava støðugt samband við starvsfólkini á Barnaheiminum alt eftir tørvinum hjá hvørjum einstøkum. Ìbúðirnar kunnu liggja leysar av høvuðsbygninginum. Ein møguleiki er at byggja sjálvstøðugar íbúðir sum eru heilt leysar. Annar møguleiki er at byggja eina eind við 6 íbúðum, sum eru leys av høvusbygninginum. Eisini ber til, at byggja eina eind, sum er bygd saman við høvuðsbygninginum. Møguleiki skal vera hjá starvsfólki at ganga ímillum íbúðirnar/eindina og høvuðsbygningin. Bólkurin mælir til, at tær 6 íbúðirnar, sum eru ætlaðar til tey ungu á Barnaheiminum, verða hugsaðar sambært ”Tiny houses solution”.

### *Serlig atlit til børn og ung, sum bera brek og eru sett heiman.*

Vísandi til, at Barnaheimið skal kunnað hýsa børnum, sum bera brek av ymiskum slagi, sum verða setta heiman, so eiga atlit at takast til atkomuviðurskifti í breiðasta týdningi.
Sum heild mælir bólkurin til, at ljóð og ljósviðurskifti á Barnaheiminum taka atlit til, at børn sum eru sett heiman kunnu vera sensitiv, hava angist, hava órógv og tí hava tørv á "róligum" umhvørvi. Sí eisini lýsing av skermaðu íbúðunum.

Bólkurin mælir til, at hvør eind hevur kømur og vesi sum børn, sum sita í koyristóli kunnu húsast í. Tað kann eisini koma fyri, at eitt barn sum ber fjølbrek, verður sett heiman. Tí eiga atlit eisini at takast til hesi. T.d. kann eitt kamar verða innrættað soleiðis, at barnið kann búleikast har á jøvnum føti við onnur børn. Hetta merkir, at kamar og baðiverilsi skal verða nóg stórt til seingjarlegu. Eisini skal verða lætt at seta upp skinnarar v.m. Møguleiki skal eisini verða hjá einum barni við fjølbreki at búleikast í alrúminum.

Uttanumøkið skal somuleiðis taka hædd fyri, at fólk við koyristóli skulu kunnu ferðast til og frá barnaheiminum og teim fasilitetum, sum eru rundanum barnaheimið. Mælt verður til, at tvey av teim 20 parkeringsplássunum verða tilskilaði koyristólsbrúkarum um hesi eru á barnaheiminum.

Sí annars blástur á:
https://cebraarchitecture.dk/project/future-childrens-home/
Familieskolen i Gladsaxe kommunu